

# Mótav

Tað eru stórir møguleikar í eini føroyskari mótavinnu, men tað ber ikki til at leggja ein yvirskipaða ætlan fyri hesa kreativu vinnu. Tað er upp til hvønn einstakan mótaskapara at finna sína leið. Landsstýriskvinnan við vinnumálum er farin í holt við at kanna, hvussu tað almenna kann stuðla nýggjum vinnum á rættan hátt

Føroyskir mótaskaparar og klædnaframleiðarar eru farnir at finna vegin út í heim, samstundis sum alsamt fleiri fólk alsamt oftari føra fram, at føroyingar skulu fiska eftir nýggjum vinnum og ikki bara hava fiskivinnuna at dúva uppá.

Størsta og mest nýskapandi vinnuátakið, sum er gjørt higartil í ár, stóð mótafyritøkan Guðrun & Guðrun fyri, tá tær fyltu eitt flogfar við útlendskum gestum, flugu teir úr Keypmannahavn til Føroya og høvdu eina stóra mótaframsýning í hangarinum á flogvøllinum í Vágum.

Átakið hjá Guðrun & Guðrun gav ekkó uttanlands,

*Føroyskar móta- og klædnafyritøkur hava víst, at tað ber til at gera nakað við nýggjar vinnur í Føroyum, og nýggja landsstýriskvinnan við vinnumálum vil gjarna stuðul nýggjum vinnum á rættan hátt*